# Tiltøk

**Mánakvøldið 11. okt.**
Niels Pauli Danielsen andakt á Giljagarði í Leirvík kl. 19.30.

**Mikudagin 13. okt.**
Norðoya Røktarheiminum kl. 15: Gudstænasta kl. 15. Altarg. Magnus B Jørgensen.

**Hósdagin 14. okt.**
Sambýlið á Heygnum kl. 19.30: Andakt. Magnus B Jørgensen

**Argir, Kirkju- og missiónshúsið**
Mánakvøldið kl 20 Sjómanskvinnuringurin kemur saman. Týskvøldið kl. 20 Argjakórið venur. Kl. 20.30 Ungdómsmøti Hóskvøldið kl. 20 Bíbliutími. Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Argjakórinum

**Samkoman Marknagil Fjalsg.2, Tórshavn**
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/ uppbyggingarmøti. Ver hjartaliga vælkomin

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagur kl. 15 í KFUK: Seinnapartsamkoman við Louisu Niclasen Hansen. Týsdagur onki várgleði vegna heystfrí. Mikudagur Ten-sing kórið venur ikki vegna heystfrí. Hósdagur onki verður í KFUK vegna heystferiu.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Mánakvøldið kl. 20 lovsangs- og bønarløta. Mikudagin kl 17.15 Barnakórið venur. Sunnudagin onki morgunmøtið vegna legu. www.gospel.fo

**Meinigheitshúsinum í Havn**
Mánakvøldið kl. 19 Juniormøti Týskvøldið kl. 20 Bíbliutíni v/ Marius Múller, Mark 11, 15 - 33. Mikukvøldið kl. 20 Felagskóri venur. Hósdagin kl. 16 Venur gentukórið. Kl. 20 Ungdómsmøti, Heysthugni. Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti v/ Dan Eliassen, sangur Sámal J. Jakobsen. Øll eru vælkomin

**Filadelfia Tórshavn**
Mánadag Kl. 07.15 Morgunbøn. Kl. 20 Bønarskúlin. Mikudag kl. 16.30 Bøn Ísrael og býnum. ONKI Delli vegna heystfrí Fríggjadag kl. 07.15 Morgunbøn. Kl. 20 Mammur hittast til bøn. Leygarkvøldið kl. 21 Flare. Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, Alex O'Campoo talar. Kl. 13.15 SundagsKool. Kl. 18 Samkomufundur www.filadelfia.fo

**Ebenezer**
Mikukvøldið kl. 20 Einki møti í Ebenezer. Møti verður á Zarepta. Les meira á www.ebenezer.fo Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti. Evnið er "Tú kanst ger mun". Leygardag kl. 14-18 Sera áhugaverdur fyrilestur við heitinum "Er Bíblian álítandi?" Fyrilestrarhaldari er Dr. David Reid. Øll eru hjartaliga vælkomin, ikki er neyðugt at melda seg til. Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Dr. David Reid talar. Barnaansing er meðan møti er. Kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Evangelisktmøti. Dr. David Reid talar. Barnaansing er meðan møti er. Mánakvøldið kl. 20.30 Hugnaløta fyri yngri kvinnur. www.ebenezer.fo

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Mánakvøldið kl. 19.30 Andakt á Ellisheiminum. Týskvøldið kl. 20 Hornvenjing. Mikudagin kl. 15 Bønarmøti. kl. 19 Andakt á Sambýlinum oman Hoydalar. Kl 19.45 Andakt á Vallalíð. Hóskvøldið kl. 20 Heimaforbundið. Sunnudagin kl. 11 Halgunarmøti v/Sunnudagsskúla. Kl. 17.30 Bøn. Kl. 18 Møti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoman**
Møti verður sunnukvøld kl. 18. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Missiónsvika verður í døgunum 10. til 14. nov.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 19.30 bønarløta. Kl. 20 bíbliutími. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin Vágur**
Mánakvøldið kl. 20 Bønarløta Týsdagin kl. 9.30 orðið á borðið. Kl. 20 heimaforbund.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Týskvøldið verður bønatløta kl. 19.30 og bíbiltími kl. 20 v/ Derhard Jógvanson. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Sjómannskvinnuringurin kemur saman hóskvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar

**Eldrafelagið Kumlá á Skála**
hevur hugnakvøld týskvøldið 12. okt. kl. 19

**Meinigheitshúsið á Skála**
Mánakvøldið 11. okt. kl. 19.30 kemur sjómanskvinnuringurin saman. Hanna Olsen fyristøðukvinna á sjómansheiminum Bethel sigur frá. Allar kvinnur hjartaliga vælkomnar,

**Hjúnabandsskeið við Steen Palmqvist**
Fríggjadagin 15. okt. og leygardagin 16. okt., hevur Steen Palmqvist hjúnabandsskeið í Kelduni í Skálafirði. Kostnaðurin er 200,- kr. fyri hvønn íroknað døgurða og drekka. Tilmelding á tlf. 742054, 581512 og á telduposti tvorfoss@kallnet.fo Sí annars á www.keldan.fo

**Lívsins Orð, Saltangara**
Mánakvøldið kl. 18 Tim 5 Mikukvøldið kl. 19.30 Bønarmøti. Kl. 20.30 Ungdómsmøti. Sunnudagin kl. 10.30 Møti Øll hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K í Klaksvík**
Týsdag kl. 10 Lítlakuff Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími við Øssur Kjølbro "Bíbliunar trúvirði 2"

**Soli Deo Gloria**
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti Leygarkvøldið kl. 20 møti v/ Helle og Daniel Ottsen. Sunnukvøldið kl. 18 møti v/ Helle og Daniel Ottsen Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti

**Getsemane Stangaskákið 1, Klaksvík**
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti v/breyðbróting

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf. 316491/286491*
*Opið er mánadag – hósdag kl. 9-17 og fríggjadag 9-16 tilhald@torshavn.fo Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
Mikudagur
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið. Kl. 9 Horn- og beinarbeiði. Tilmelding: 316491, Rasmus Nygaard. Støkk inn á gólvið um hetta hevur tín áhuga. Kl. 9 Veving. Tilmelding: 316491, Joana Bjarnastein. Kl. 9 Maskinbinding, Marita Guttesen. Kl. 9.30 Fimleikur menn, Dánjal Húsgarð. Allir menn eru hjartaliga vælkomnir. Kl. 10.30 Bindiklubbur. Kl. 15 Túrur: Hvítanes, Randi og Elisabeth, fysioterapeutar. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Hósdagur
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið. Kl. 10 Fimleikur fyri kvinnur, Greta Ellingsgaard. Allar kvinnur eru vælkomnar. Kl. 11 Lesibólkurin hittast 28. okt. 1. hædd í køkinum. Vit lesa: "Mågelatter", Kristín Marja Baldursdóttir. Øll, ið hava áhuga í bókmentum eru vælkomin. Kl. 14 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen. Vit trena til kappingina í verður í Runavík 10. nov. mðr. Øll eru hjartaliga vælkomin. Kl. 15 Motiónsrúmið vegleiðing frá 15-16 Arnhold Fjalsstein.
Fríggjadagur
Kl. 9-16 Motiónarúmið opið. Kl. 9.30 Fimleikur menn, Dánjal Húsgarð. Allir menn hjartaliga vælkomnir. Kl. 10.30 Bindiklubbur. Kl. 14-16 Prát.
**Telduskeið:**
Mánadag kl. 14-16 Grundskeið (óroynd), Páll Poulsen. Týsdag 11-13 Víðkað skeið (alnótin), Páll Poulsen. Kl. 14-16 Víðkað skeið (myndir), Páll Poulsen. Tilmelding: 316491. Týsdagur kl. 9-17 Motiónsrúmið opið. Kl. 10 Vit syngja, Jóhan R. Jacobsen. Øll eru vælkomin. Kl. 15 Prát.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Føroyingafelagið Vesturskin í Bergen**
Vit koma saman 24. okt. Øll eru vælkomin. Nærri at vita hjá formanninum Anniku Sleyre, tlf. 55166077.

**Blákrossbúðin Kongagøta 10, Tórshavn**
Tekur ímóti góðum klæðum, Opið er: mánadag – fríggjadag frá kl 10-12 og 14-17.30 og leygardag frá kl 11-14. Blái Krossur hjálpir fólki í Føroyum við rústrupuleikum.

**Blákrossbúðin Heiðavegur 32, Tórshavn**
Tekur ímóti góðum klæðum. Opið er: mánadag – fríggjadag frá kl 13-17.30 og leygardag frá kl 10-13. Blái Krossur hjálpir fólki í Føroyum við rústrupuleikum

**Pensionistafelagið í Havn**
*Limirnir koma saman í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøld kl. 19, tá ikki annað er lýst. Tlf. 222733 finnurj@post.olivant.fo*
Limirnir koma saman í Losjuni mikukvøldið 12. okt. kl. 19. Hermann Oskarsson sigur frá.

**Losjan í Havn, Tinghúsvegur 18**
Fríggjadag kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnukvøldið kl. 18 er møti við Oasubrøðunum.

**Listasavnið á Sandi**
er stongt allan oktober mánaða, men letur upp aftur í november. Frá november til mai er bara opið sunnudag kl. 14-16. Bólkar o.o., sum vilja gera seravtalu um aðrar tíðir kunnu ringja á tlf. 211924 ella 361617 í góðari tíð frammanundan.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
*hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
er opið mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 13-17. Øll eru hjartaliga vælkomin

**Dagtilhaldið í Runavíkar Kommunu**
*Vit halda til í húsinum hjá Nón á Torvgøtu 2, Saltangará. Opið er mánadag til hósdag frá kl. 14-17.*
Høvi er at gera ymiskt handaligt arbeiði, spæla kort, boccia og onnur spøl. Týsdag er fimleikur/styrkivenjing. Bløðini eru til taks og ein góður drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið á Toftum**
*Opið er hesar dagar: týsdag, mikudag og hósdag frá kl. 15 til 18. Øll eldri eru vælkomin*

**Kambsdalur, Handilsskúlin**
Týskvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Dagtilhaldið í Fuglafirði**
Vit eru farin í summarferiu.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35 Klaksvík · tlf. 459091 dagtilhaldid@post.olivant.fo Opið er: Mánadag til hósdag kl. 13.30 – 17.30*

# Merkisdagar

## Diamantbrúdleyp
Hósdagin 28. okt. kunnu Mása og Jógvan Tróndheim, Klaksvík, hava diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18, har øll eru vælkomin. Tey, ið ynskja at gleða diamantbrúðarparið henda dagin, verða biðin um at siga frá innan 20. okt. á telefon 456822.

## 80 ára føðingardagur
Mánadagin 11. okt. fyllir Elsa Samuelsen, Kollafirði, 80 ár. Dagurin verður hildin í Skótahúsinum í Kollafirði sunnudagin 17. okt. frá kl. 14 til 19. Øll eru vælkomin.

## 80 ára føðingardagurin
hjá Sølvi Mortensen á Sandi verður hildin fríggjadagin 15. okt. kl. 17 í Missiónshúsinum. Øll eru hjartaliga vælkomin. Gávur og blómur eru óynskt. Men eina gávu til Missiónshúsið er vælkomin.

## 85 ára føðingardagurin
Týsdagin 12. okt. fyllir Petrina Hansen á Brekku 46, Klaksvík, 85 ár. Dagurin verður hildin í Skálanum frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## 75 ára føðingardagur
Týsdagin 12. okt. fyllir Denhard Hansen, Tórshavn, 75 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 16. okt. í Frelsunarherinum, Tórsgøta 19, frá kl. 15 til 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## 70 ára føðingardagur
Mikudagin 13. okt. fyllir George Berjastein, Fuglafirði, 70 ár. Dagurin verður hildin í Lonini í Fuglafirði leygardagin 16. okt. frá kl. 12 til 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## 65 ára føðingardagur
Fríggjadagin 22. okt. verður Elsa Maria Sigurðsson, Klaksvík, 65 ár. Dagurin verður hildin í Húsmørðafelaginum leygardagin 23. okt. kl. 19. Tey ið ynskja at gleða meg at koma í føðingardag, vinarliga sigið frá aðrenn 17. okt. á tel.: 456579, 216579 ella 755211.

## 50 ára føðingardagur
10. nov. verður Georg eystan Á 50 ár. Dagurin verður hildin 13. nov. kl. 19. Tey ið vilja við í gildi, verða biðin um, at boða frá, áðrenn 6. nov. á tel.: 272509.

## 30 ára føðingardagur

Fríggjadagin 22. okt. verður Eydis á Løgmansbø 30 ára gomul. Dagurin verður hildin í Róðrarneystinum hjá Argja Róðrarfelag (Argjavegur) leygardagin 23. okt. kl. 19. Tey sum ynskja at gleða Eydis, kunnu tekna seg á tel. 217686 / 317686 innan 12. okt.

## Brúdleyp

Leygardagin 23. okt. giftast Christina av Reyni, Tórshavn, og Leif á Bøgarði, Kaldbak. Vígslan verður á AutoService kl. 12 , eftir vígsluna eru øll vælkomin til brunch. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Brúdleyp

Leygardagin 13. nov. giftast Martha Isabella T. Thomassen og Birgir Lauritsen, Miðvágur. Vígslan verður í Miðvágs kirkju kl. 14. Opið hús verður í SÍF húsinum í Sandavági frá kl. 19. Tey ið ynskja at heilsa uppá brúðarparið verða vinarliga biðin at siga frá áðrenn 23. okt. Martha tlf. 257329 - Birgir tlf. 269797 heima tlf. 332433 - mail martha-birgir@hotmail.com - martha-birgir@hotmail.com